# Abbi og eg og Abbi

Høvundur: Dánial Hoydal (FO)
Myndprýðari: Annika Øyrabø (FO)
Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2021

Tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2022

Søgugongd: Søgan er um vinalagið millum ein drong og abban. Teir báðir gera orðaspøl, geva dunnunum og hava tað stuttligt. Men so brádliga broytist abbin og heldur uppat at flenna.

Evni: familja, vinalag, skemtingarsemi, kenslur og sjúku

## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**Hygg at for- og baksíðuni. Hvat síggja tit? Hvat halda tit, tað svarta á baksíðuni ímyndar? Hygg at opnuni við køliskápinum. Hvat síggja tit í køliskápinum?**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at forsíðuni og baksíðuni. Hvat mann bókin vera um?**

**2. Hyggið at opnuni við køliskápinum. Finna tit okkurt, sum ikki er vanligt at finna í køliskápinum? Hví halda tit, at tað liggur har?**

**3. Hyggið at myndunum í bókini. Hvat dámar abbanum og dreinginum at gera saman?**

**4. Hvat dámar tær at gera saman við abba tínum, ommu ella øðrum eldri fólki í familjuni? Tekna og greið frá!**

**5. Tað eru nógv súrepli í bókini. Kenna tit aðrar søgur ella ævintýr um súrepli?**

### MIÐLINGAR

**1) Hyggið at for- og baksíðuni. Hvat síggja tit? Forsíðan hevur ljósar litir, og baksíðan myrkar. Hví man munur vera á litunum?**

**2) Hygg at opnuni við køliskápinum. Tit skulu skriva ella tekna tríggjar listar:**

**a) Hvat sært tú í køliskápinum?**
**b) Hvat er vanliga ikki í einum køliskápi?**
**c) Hvat er í køliskápinum heima hjá tykkum?**




**3) Hyggið at opnuni, har drongurin heldur á einum leyki. Hvat halda tit, mann vera hent? Er annað á myndini, sum er øðrvísi? Hví heldur tú, at teir báðir síggja keddir út?**

**4) Abbin er farin at gloyma og leggur ting, har tey ikki eiga at liggja. Hvat merkir tað at vera gloymskur? Kennir tú onkran, sum er gloymskur?**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat heldur tú um bókina? Var okkurt, sum var torført at skilja? Finnur tú mynstur og líkleikar til aðrar søgur?**

**2. Hyggið at for- og baksíðuni. Hyggið ígjøgnum bókina. Á for- og baksíðuni og í allari bókini eru myndirnar ljósar og myrkar. Hví mann myndprýðarin hava brúkt bæði? Hvat huglag vil myndprýðarin fegin vil hava fram?**

**3. Hvat halda tit um bókina? Hvar er tað staðið í bókini, tykkum dámar best?**

**4. Lesið heitið á bókini. Hví mann ein endurtøka vera í heitinum?**

**5. Abbin ger orðaspøl og spyr, um drongurin vil hava "heks við lukti" í staðin fyri "keks við frukt". Kennir tú onkran, sum dugir væl at spæla við orðum? Finnið upp á egin orðaspøl!**

**6. Drongurin hevur ampa av abbanum og tosar við mammu sína um tað. Hvussu svarar mamman, og hví sigur hon soleiðis?**

**7. Hvussu heldur tú, at tekningarnar munnu vera gjørdar?**

**8. Gerið ella teknið tykkara egnu andlit á sama hátt, sum myndprýðarin hevur gjørt myndirnar. Tit skulu royna at gera tykkara egnu sermerki ógvuliga týðilig.**

---

**LES EISINI:**

**Georg er burtur (Georg er borte á norskum) eftir Ragnar Aalbu**

---

MÁLBITIN

# "Gloymska"

| | |
|---|---|
| svenskt | **Glömska** |
| danskt | **Glemsel** |
| norskt | **Glemsel** |
| íslendskt | **Gleymska** |
| føroyskt | **Gloymska** |
| grønlendskt | **Puigugaq** |
| finskt | **Unohdus** |
| norðursamiskt | **Muittoheapmi** |



**Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við #nordiskabokslukaren!**